**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 6/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd** (Ókeypis læknaváttan)

Kári P. Højgaard og Jógvan Skorheim hava vegna Sjálvstýri lagt málið fram 21. august 2018, og eftir 1. viðgerð 19. september 2018 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 26. september, 23. oktober, 6., 20, 27. og 29. november 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Kommunulæknafelagið, Landsfelag Pensjónista og landsstýrismannin í heilsu- og innlendismálum, Sirið Stenberg, saman við Heilsutrygd.

Nevndin vil vísa á, at fyrr kravdist læknaváttan í sambandi við endurnýggjan av koyrikorti, tá bilførarin varð 70 ára gamal. Hetta er í dag broytt til 75 ár. Næstu ferð læknaváttan skal fylgja við, er tá bilførarin verður 80 ára gamal, og síðani annaðhvørt ár aftaná tað. Skulu aðrar broytingar gerast, metir nevndin ikki, at Heilsutrygdarlógin er rætta staðið at gera hesar í.

Ein samd nevnd tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Trivnaðarnevndin, 29. november 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Katrin Kallsberg<br>formaður | Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur<br>næstformaður | |
| Óluva Klettskarð | Jenis av Rana | Djóni Nolsøe Joensen |
| Sonja Jógvansdóttir | Kaj Leo Holm Johannesen | |